

*Lars Grundberg og konan Gunnhild hava veruliga fingið eyguni upp fyri nógvum av tí ríkidøminum sum finst í Føroyum, bæði innan mentan, list, sniðgeving, fiskivinnu og ferðavinnu*

# Sviar nógv at læra av føroyingum

**- Tað eru nógvir møguleikar í samstarvinum millum Svøríki og Føroyar. Vit skulu bara finna teir og síðani fara til verka, sigur Lars Grundberg, svenskur sendiharri í Danmark eftir vitjan sína í Føroyum**

SENDIHARRI

*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Samstarv:** - Í dag er ikki javnvág í útflutninginum av vørum millum Svøríki og Føroyar. Sviar útflyta fyri einar 200 mió um árið, meðan føroyingar einans útflyta fyri ein fjórðing ella fimting av hesum.

Hetta kunnu vit gera nakað við. Og tað er tí eingin loyna, at vit fegin síggja enn fleiri føroyskar vørur á svenska marknaðinum, sigur Lars Grundberg.

Eftir ferð sína í Føroyum kann hann bara staðfesta, at føroyingar kunnu læra nógv av svium. Men sviar kunnu so sanniliga eisini læra nógv av føroyingum, m.a. tá talan er um fiskivinnuna á landi og sjógvi.

Tit vita, hvat tað vil siga at liva í samsvari við náttúruna. Og tit hava somuleiðis dugað at sæð, at tilfeingið av fiski er ikki óendaligt.

Hetta sama eru vit mitt í nú, ið ein stór kreppa er innan fiskivinnuna í Eystursjónum. Har uppliva vit í løtuni, at fleiri av fiskasløgunum er hótt, sigur Lars Grundberg.

Hann hevur hesa vikuna verið á vitjan í Føroyum saman við konu síni, Gunnhild. Og skal ein ganga eftir tí sum hann sigur, so verður hann skjótur aftur.

Skráin hesaferð loyvdi teimum ikki at hitta teir umleið 30 sviarnar, sum búgva í Føroyum. Men tað ætla tey so á næstu vitjanini.

### Ambitiónir í Klaksvík

Gunnhild og Lars Grundberg hava vitjað ymsastaðni kring landið, m.a. í Havn, Eysturoynni og í Klaksvík, har tey hava hitt politikkarar, vinnulívsfólk og eisini svenska aðalkonsulin í Føroyum, Bjørn á Heygum.

Eitt, sum tey gjørdust sera ovfarin av var, hvussu væl fiskivinnan var skipað í Klaksvík, og her serliga innan virksemið hjá JFK.

Vit sóu her, hvussu framleiðslan fór fram á virkinum, um skipini, og um teirra ætlanir og ambitiónir fyri framtíðina. Hetta var sera áhugavert, sigur Lars.

Óhugsandi er tí ikki, at eitt føroyskt framtak verður í Svøríki komandi ár, har m.a. JFK fer at eiga ein t‡ðandi leiklut.

Men tað var kortini ikki bert fiskur og fiskivinna á skránni undir steðginum hjá svenska sendiharranum.

Tey fingu eisini eyguni upp fyri nógv øðrum viðurskiftum, sum samstarvast kann meiri um í framtíðini.

- Tit eiga ótrúliga góðar sniðgevar her á landi. Teir hava sín egna smak, sum onnur áttu at sloppið at sæð, sigur hann.

### Listarfólk í heimsflokki

Tit føroyingar hava eina serstaka mentan, serstaka list og eitt serstakt mál, sum eg haldi at fólkið í Svøríki átti at fingið størri kunnleika um, sigur Lars.

Í Svøríki finst jú eitt vælkent Kunstakademi, og hagar áttu føroyingar at leitað sær. Og eisini áttu sviar at leita sær hendavegin.

Eg havi sæð, at tit eiga listarfólk í heimsflokki. Og tað er eitt heilt ótrúliga ríkt mentanarlív, sum finst her í Føroyum.

Tí skilji eg eisini væl, at stóri listarmálarin, Ingálvur av Reyni verður so nógv virdur og nú saknaður, sigur Lars.

Fyri hann eru Føroyar sum ein bensinstøð hjá listarfólkum, har tey hava bestu møguleikar at fáa ífyllu og íblástur til verk síni.

### Kulinariskt

Ferðavinna og handil hoyra sjálvandi eisini við til eitt samstarv millum tvey slík umráðir.

Svenski sendiharrin vísti á, at sviar hava eitt veruligt ynski fyri samstarvi við føroyingar, bæði tá talan er um handil, mentan, útbúgving og onnur øki.

Í Svøríki finst eitt serstakt kulinariskt akademi, har ein kann fáa sær eina góða útbúgving sum kokkar og annað innan hotellvinnuna.

Vinnumálaráðharri tykkara – Bjarni Djurholm – hevur sjálvur vitjað henda skúlan. Og hetta skuldi tí verið ein góður møguleiki hjá føroyingum at leita sær í lestrarørindum, sigur Lars Grundberg.

# Økja føroyska útflutningin

**Løgmaður hevði mánadagin vitjan av svenska sendiharranum í Keypmannahavn, Lars Grundberg**

SENDIHARRAVITJAN

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Lars Grundberg, svenskur sendiharri í Keypmannahavn, umrøddu millum annað føroyskan limaskapur í norðurlendska samstarvinum. Løgmaður gjørdi svenska sendiharranum greitt, at Føroyar eiga at kunna gerast limur treytað av, at Helsingforssáttmálin verður samsvarandi broyttur til eisini at fevna um sjálvstøðug mentanarøki.

Løgmaður vísti til WTO-sáttmálan har, umframt sjálvstøðug ríki, eisini sjálvstøðug tolløki eru limir - eitt nú Hong Kong, Makau og ES. Løgmaður legði dent á, at vísa tey eysturnorrønu londini ikki størri áhuga fyri føroyska ynskinum, kunnu Norðurlond „brotna av um miðjuna" - í vesturnorðurlond og eysturnorðurlond, har tey fyrru lýta suðureftir og vestureftir og har tey seinnu lýta eystureftir. Svenski sendiharrin helt fyri, at nú eigur at verða bíðað eftir niðurstøðuni hjá norðurlendsku samstarvsráðharrunum.

Løgmaður gav eisini rúma kunning um framtíðar føroyska oljuvinnu og væntaðar avleiðingar av henni.

Svenski sendiharrin mælti til at taka nøkur ítøkilig stig til tess at økja um føroyska útflutningin til Svøríki. Hann segði eisini, at tað er sera umráðandi at marknaðarføra Føroyar í Svøríki og serliga sum ferðavinnuland í Stokkhólmi, tí at her er so sera nógv at bjóða ferðafólki við serligum áhuga fyri eitt nú náttúru og mentan.

# Menna vinnulívið í bygdini



*Sørvágs kommuna ynskir at gera nakað fyri vinnumøguleikarnar og menningina í kommununi*

**Sørvágur:** Bygdaráðið í Sørvági ætlar sær nú at gera nakað fyri vinnulívið í bygdini.

Á fundi í farnu viku legði borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen eitt skriv fyri hinar limirnar um vinnuviðurskifti.

Sambært uppskotinum so skal setast ein nevnd av bygdaráðslimum at gera eitt tilmæli um, hvussu kommunan kann skipa eina fasta vinnu- og menningarnevnd.

Bygdaráðið tók undir við hesi ætlanini, og nú er tað so uppgávan hjá hesi nevndini at gera eitt tilmæli um, hvussu víðari skal farast fram í hesum máli. Í nevndini sita teir tríggir bygdaráðslimirnir Jógvan Páll Joensen, Sune Jacobsen og Erik Davidsen.

**sb.**

# Framvegis neyðugt at breiðka vegin

**Akrar:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at breiðka landsvegin úr Lopra og út á Akrar.

Hetta arbeiðið fevnir um breiðking av einum 1400 metrar longum vegastrekki við eini vegabreidd uppá 5,5 metrar og við eini vegøksl upp á hálvan metur.

Í hesum mánaðinum staðfestir Landsverk, at 1. byggistig av íalt trimum er liðugt. Teir fyrstu umleið 400 metrarnir eru liðugt asfalteraðir og vegastokkur er settur upp.

Sagt verður, at í 2. byggistigi, sum umfatar gerð av 350 metrum aftrat, at har er grovplaneringin liðug. Grótið til hesa planeringina er tunnilstilfar úr Lopradali.

Landsverk upplýsir, at enn er ógreitt nær hetta 2. byggistigið og tað seinasta verða liðug. Tað er alt treytað av, hvør játtan fæst.

**sb.**

# Betri umstøður til kappróðurin



*Árnfirðingar ynskja at gera nakað fyri kappróðurin í bygdini. Nú eru so fyrstu tøkini tikin til nýtt kappróðrarneyst í bygdini*

**Árnafjørður:** Árnafjarðar Kappróðrarfelag ætlar nú at gera nakað við felagið í bygdini.

Fyrr í ár játtaði Klaksvíkar kommuna eitt grundøki til kappróðrarneyst í bygdini. Hetta lá innanfyri eina ætlaða neystaútstykking í Árnafirði.

Kappróðrarfelagið hevur seinni skotið upp at neystið ístaðin fyri kann verða bygt á einum øki í bátahylinum.

Á fundi í býráðnum í farnu viku varð samtykt, at neystið kann verða bygt í bátahylinum.

Felagið luttók í summar við bátinum Árnfirðingur í FM-kappingini fyri 8-mannafør.

**sb.**